# Kvøða frá Regini til William

**YRKING.** Á 85 ára degi William Heinesens heilsaði skaldið og tónasmiðurin Regin Dahl honum við hesi yrking.

Vi, som blev født på disse, på rød og grøn tuf
baserede fjeldmassiver, som langsomt og sikkert
synker og hurtigt og lidt mere usikkert
søndersprænges af oceanet —
vi, som blev født et par favnes strandbred
fra dette klodens altdominerende element —
vi erkendte fra første færd
menneskelivets vilkår.

Vor lille stad, med smøger og smug,
var jo, som du skæmtsomt har sagt,
lige så godt et tilværelsens midtpunkt
som Azerbaidjan eller Alabama.

Her levede vi, jævne folk, med alskens
kalamiteter, indbyrdes skændsmål og sagsmål —
men vi hørte så inderligt sammen
i vor hverdagskamp for udkommet.

Når daggryet steg vældigt over os,
når stormhavet skumfyldte vore gyder,
når de ubegribelige stjenebilleder
tindrede over vore huse.

Og så sommertiden:
kabbelejer i hver lavning,
og fædrenes marker,
skærmet af lavgrå stengærder,
duftende af timian og kløver —
og solen, den gyldne sol,
som aldrig rigtigt gik ned.

Siden søgte vi lærdom og visdom
i syd og øst —
Bhagavadgita, Konfutse,
Upanishaderne, Spengler etc. —
også hos dem, der med vold
ville lave os om
på en omstigningsbillets tid.

Men jævne var de folk,
vi voksede op iblandt, og jævne
var de mennesker, der glædede dit sind
på din livsvej:
den gamle morlil i det fjerne
russiske rige som hjemme i Tórshavn.

Ja, vi er jævne. Og den ægte jævnhed
var vor drøm.
Jævnhed og kærlighed.
Vi ser den overalt i vort
telluriske liv som et forsøg.
En misdannelse?
De underkuedes revanche?

Nej, ingenlunde.
Ihvorhen vort kamera søger,
ser vi denne blidhed, denne godhed
blandt alle modermælksugende dyr —
og ligervis hos de andre
på deres manér —
En sublunarisk fejl
i brutalitetens rige?
Eller et forsøg?
Et kosmisk forsøg?

Vi tror på dette kosmiske forsøg.
Magt og mammon forsager vi
og frasiger vi os.
Blidhedens og godhedens
solidaritet bekender vi os til —
"idet vi ydmygt fatter
om vor skærv af evighed".

**Regin Dahl**

*Yrkingin stóð í danska blaðnum* ***Politiken*** *tann 15. januar 1985.*



**William Heinesen**



**Regin Dahl**





**– Vónandi kunnu vit um ikki so langa tíð bjóða fyrsta føroyinginum hendanvegin, sigur leiðarin av listamiðstøðini í Dalåsen í Noregi**

# Listafólk í friði og náðum

**LIST.** Fyri seg sjálvi á einum hamri nakrar 100 metrar frá lítlu norsku bygdini Dale, kunnu listafólk í friði og náðum royna seg innan trælist. Óvanliga nógv listafólk ynskja at koma til Dalsåsen, og tey, sum koma ígjøgnum nálareygað, eru sera væl nøgd

*Jógvan Hugo Gardar*

(DALE, NOREG) Her eru øll listafólk vælkomin, sum gjarna vilja royna okkurt nýtt, sigur stjórin í norðurlendsku listamiðstøðini Dalsåsen, Arild Bergström. Eingir føroyingar hava verið á støðini, men teir eru vælkomnir, sigur hann.

– Her havi eg frælsi til at royna okkurt nýtt. Hetta er ein óførur møguleiki hjá mær at finna nýggjar búnar til mína list, sigur tann norski listamaðurin Frank Åsnes. Vit hitta hann í einum av starvsstovunum, sum listafólk kunnu læna í styttri tíðarskeið á norðurlendsku listamiðstøðini Dalsåsen í Dale.

Dalsåsen liggur í norska fylkinum Sogn og Fjordanen, stutt norðanfyri Bergen. Frank Åsnes er ein av fimm listafólkum, sum í løtuni eru á Dalsåsen. Higartil hevur Frank Åsnes yvirhøvur bara arbeitt við leiri.

– Her havi eg møguleika til at arbeiða við øllum træsløgum. Træ er eitt spennandi og krevjandi tilfar.

Hann roknar við at gera nógv burturúr viði framyvir, og hann kundi gott hugsa sær at roynt at arbeitt við jarni, stáli og øðrum slíkum tilfari.

– Tað sum kanska er tað besta við steðginum hjá mær her í Dale er, at eg fái slappa av og gjørt akkurát tað sum hóvar mær. Eg havi ikki fyri neyðini at hugsa um mína næsta søluframsýning fyri at yvirliva. Her fái eg egna íbúð og eina starvsstovu sum eg kann brúka sum tað passar mær, og miðstøðin er vælútgjørd við amboðum, serliga við amboðum sum passa til træ.

### Ein rúgva av pinnum

Í grannastarvsstovuni hitta vit skotska listarmannin Aeneas Wilder. Hann byggir listarverk av træpinnum. Hann byggir upp standmyndir, sum eru væl omanfyri tveir metrar høgar. Tá alt er liðugt, er ætlanin, at hann við at trýsta á eitt ávíst stað á standmyndini, skal fáa alt rapla saman eftir nøkrum fáum sekundum.

Hann tekur hendingina upp á sjónband, so hetta kann vísast fyri umheiminum. Eg spyrji um ikki hansara mál er at gera list, sum kann standa eftir hann.

– Tað er eitt mál ein listamaður kann hava. Eg royni at finna út av, hvussu hesir pinnarnir kunnu setast saman til stór verk sum eftir lítlari løtu gerast til eina rúgvu av træpinnum. Ikki altíð eydnast líka væl, men tað ger einki, sigur Aeneas.

– Eg havi tikið alt upp á sjónband, so eg veit, hvussu eg bygdi listaverkið, so eg kann byggja tað uppaftur av nýggjum við neyðugum broytingum. Hetta kann eg gera fleiri ferðir, tí eg gevist ikki, fyrr enn eg fái hugskotini til at virka, sum eg vil hava tey at virka.

– Eg havi eitt hugskot um hvussu listaverkið skal síggja út tá eg byrji, men listaverkið broytist, meðan tað verdur skapað, sigur Aeneas Wilder.

### Royna okkurt nýtt

Stjórin á listamiðstødini, Arild Bergström, sigur, at endamálið við at bjóða listafólkum eitt uppihald á staðnum er at geva teimum møguleikan at royna okkurt nýtt.

– Tey kunnu royna okkurt nýtt, ella tey kunnu royna at menna tað, tey longu eru dugnalig til, sigur Bergström.

Hann leggur afturat at tey ikki leggja seg uppí hva listafólkini gera. Tað er av alstórum týdningi er at tey gera sum tað passar teimum.

Nordisk Kunstnarsenter Dalsåsen, sum listamiðstøðin kallast, er opin fyri norðurlendskum listafolkum. Harafturat er eitt UNESCO-stipendium knýtt at staðnum, og tí koma eisini listafólk úr fjarskotnum londum til Dale. Áhugin fyri at koma til Dalsåsen er stórur. Seinast, tey tóku inn fólk, høvdu heili 430 søkt um at fáa eitt av fimm plássum.

### Føroyingar vælkomnir

Arild Bergström sigur at roynt verður at fáa fólk úr øllum norðanlondum til Dale. Higartil hevur hetta gingist hampuligt, men enn hevur einki føroyskt listafólk verið á staðnum.

- Vónandi kunnu vit um ikki so langa tíð bjóða fyrsta føroyinginum hendanvegin. Vit hava havt umsóknir úr Føroyum, uttan at hesi eru vald út.

Tey sum søkja um at koma til Dalsåsen, skulu prógva, at tey eru listafólk við at senda inn dømi um listaverk, tey hava gjørt.

Á Dalsåsen eru altíð í minsta lagi fimm listafólk. Pláss er til fleiri í íbúðunum, men koma fleiri enn tey fimm útvaldu, noyðast tey at rinda fyri uppihaldið sjálvi. Hendan møguleikan hava fleiri brúkt. Serliga pør har bæði eru listafólk.

### Norðurlendsk list á einum staði

Nordisk Kunstnarsenter Dalsåsen (NKD) er ein norðurlendskur stovnur undir Norðurlendska Ráðharraráðnum. Endamálið hjá NKD er at menna tað norðurlendska samstarvið á listaøkinum.

Miðstøðin hevur alla útgerð, sum er neyðug fyri at kunna arbeiða við træi. Eitt av endamálunum hjá NKD er at syrgja fyri at gamlir hættir at arbeiða við træi vera bornir víðari til næsta ættarlið.

Dalsåsen fær pengar til daglig raksturin frá Norðurlendska Ráðharraráðnum.

Øll myndlistafólk, listhondverkarar, designarar og arkitektar hava møguleika fyri at fáa stuðul til at vera á Dalsåsen.

Listafólkini kunnu vera á staðnum frá trimum mánaðum til eitt heilt ár. Møguleiki er at søkja um nýtt uppihald seinni.

Fimm starvsstovur og fimm íbúðir eru á Dalsåsen. Hesar eru nóg stórsr til at listafólkini kunnu taka familju við sær.